FRITT VAL BINGO
Tað væl umtókta fría val bingo'ið er hvørt mikukvøld kl. 19.30 í Tórs Cafeteria, N. Finsensgøtu 38, har øll eru vælkomin. 15 vinningar eru á lutaseolinum. Seinasti vinningur á bingo'num hevur virði 1.200 kr.
Stuðlafelagið
Tór's Klubbin, tlf. 15438

GOTT JÓLABINGO
verður í Ólastovu 1. des. kl. 19.30. Vinningar: ræst kjøt, karamellur o.a. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á 5.000 kr.
Funnings Bygdarfelag

BASARUR
verður í K.F.U.K. hóskvøldið 30. november kl. 19. Inngangur við Almu Bjartalíð. Borðsøla (m.a. hondbundnir lutir og køkur). Konditarí, fiskibrunnur og tombola. Eydnuhjólið byrjar kl. 20. Til seinast verður lutaseðilin drigin. Vit taka við tøkk móti gávum.
K.F.U.K., Varðagøta 9

GOTT JÓLABINGO
verður í Pálsstovu hóskvøldið kl. 19.30. 400 kr. til fulla plátu, enskar karamellur til aðru hvørja rekkju. 5 økeypis plátur. Vinningar verða m.a. før. gás, før. krov, 2x500 kr., jólakurvar, dekoratiónir og adventskransar. Koyring heim.
Kaldbaks Bóltfelag

GOTT JÓLABINGO
verður í Pálsstovu friggjakvøldið 1. des. kl. 19.30. Vinningar m.a. gávukort á 500 kr., ræst kjøt, karamellur o.a. Drigið verður millum spølini. Koyring heim aftaná.
9. B á Eysturskúlanum

JÓLABINGO
verður hóskvøldið 30. nov. kl. 19.30. Eykaspælið heldur fram.
Kongshavnar Kvinnufelag

STÓRT JÓLABINGO
verður í Pálsstovu 3. des. kl. 16.00. Vinningar verða ræst kjøt, turr veðratjógv, karamellur, jólakurvar, hondgjørd nissupør, gávukort o.a. 15 plátur 100 kr. Síðuvinningar til fulla plátu. Drigið verður millum spølini. Koyring heim.
Stuðulsfelagið hjá Havnar Fimleikarfelag

GOTT JÓLABINGO
verður í Skótahúsinum 15. des. kl. 19.30. At vinna verður alt gott til jóla, so sum 1/2 krov, dunnur, steikir, karamellur, sodavatn og nógv annað. Eykaspælið heldur fram, nú 1.300 kr.
K.F.U.M. skótarnir í Vági

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu sunnudagin 10. des. kl. 16. Nógvir góðir vinningar so sum karamellur, ræst kjøt, 10 gávukort á 500 kr. og nógv annað. Koyring heim aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Gjáar Samkomuhús

FUGLAFJARÐAR PENSIONISTAFELAG
hevur gott jólabingo í Lonini friggjakvøldið kl. 19.30. At vinna verður m.a. karamellur, feskt kjøt og ræst kjøt. Høvuðsvinningur er ein oksafjórðingur.
Nevndin

SUÐUROYINGAR!
Stórt oyggjar jólabingo verður í skúlahøllini í Trongisvági 4. des. kl. 19. Føroysk krov til fulla plátu. Burturlutað verður parabol, 4 bildekk, 3 føroysk krov, olja, bensin, karamellur og sodavatn. Økeypis eykaspæl olja fyri 1.000 kr. Økeypis bussur úr Vági kl. 18.15.
Gleðilig jól og gott nýggjár. Takk fyri stuðulin.
Flogbóltsdeildin T.B.

STUÐLAFELAGIÐ GLOTTIN
hevur gott bingo í Pálsstovu mikukvøldið kl. 19.30. 400 kr. til fulla plátu + síðuvinningar. Drigið verður millum hvørt spæl um karamellur. Burturlutaðar verða m.a. dunnur, gæs, karamellur, adventskransar og tvey gávukort á 1.000 kr. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Nevndin

STÓRT JÓLABINGO
verður í Ítróttarhøllini á Kambsdali sunnudagin 3. des. kl. 16. At vinna verða ferðir, oksafjórðingar, gávukort, jóladøgurðar, karamellur og nógv annað gott. 50 vinningar á lutaseðlinum.
Fuglafjarðar Sjónleikarafelag

FRÁ STRANDA ÍTRÓTTARFELAG
Eydnuhjól, mat- og køkutombola verður í Fimleikarhøll Stranda Skúla leygardagin 2. des. kl. 19.30.
St.ÍF

Brævaskifti

Drongur ynskir brævasamband við kvinnu í 40' árunum. 100% tøgnskylda. Skriva til :
Sosialurin, Box 76,
110 Tórshavn, undir Bill. mrk. 1022

HYGG HER!!!
Um tygum hava spurningar viðv. andaligum viðurskiftum, eru tygum vælkomin at senda teir til okkara. Skriva til
Spurnarkassan,
Frelsunarherurin




Burturm./lunnið

SILKITURRIKLÆÐI
Fagurreytt, við hvítum, grønum og gulum blómum burturmist friggjadagin 17. nov. í SMS, ella á leiðini við Tinghúsvegin/ Hoydalsvegin.
Tlf. 10008 - 12043

BURTURMIST!
Er tað nakar, ið av misgáum hevur tikið ein blåan Fjellræv ryggsekk á konsertini í Vestmanna 17. nov.? Í taskuni, ið er merkt Anna Berg, var Lewi's cowboyjakki, ur, mappa, busskort o.a. Vinarliga ring
Tlf. 17748

FALLHJÁLMUR FUNNIN
uttan fyri Auto. Er hvítur við lilla, gráum og pink mynstri. Kann avheintast í Auto.

BURTURMIST
Á veg til Havnar við Teistanum sunnukvøldið 26. nov. misti eg ein óm. ryggsekk við klæðum. Hann er brúnligur, vovin við stripum og mynstrum. Vinarliga sigið mær frá, um tit vita, hvar ryggsekkurin er.
Svanna, tlf. 12665



Býli

FJALSGARÐUR
Hevur tú hug at venda gráa gerandisdegnum bakið? Kundi tú hugsað tær nakrar dagar í óspiltum umhvørvi við góðum møguleikum at fara eitt nú á seiðaberg og gongutúr í hagan, og annars njóta »livið á bygd«? So er Fjalsgarður í Oyndarfirði staðið, tú hugsar um!
Tlf. 44522 - fax. 44570

KAMAR
til leigu til edrúiligt fólk.
Tlf. 12274

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havn. Má hava tvey kømur.
Tlf. 88188

SOS!
Hús/íbúð ynskist til leigu sum skjótast. Má hava tvey kømur. Max. 3.200 kr. við hita og el.
Tlf. 19847

HÚS Í NÓLSOY TIL SØLU
um høskandi boð fæst.
Tlf. 13976

ÍBÚÐ SØKIST
Ungt, friðarligt par søkir eftir íbúð í Havn. Max. 2.000 kr. u/ ljós.
Tlf. 18997 ella 13001, spyr eftir Lindu

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havn.
Tlf. 32891

TIL LEIGU
Hús til leigu í Hákunargøtu 3 fyri 4.000 kr. um mr. + ljós og hita.
Tlf. 31 85 55 36, e. kl. 17
Elsa og Tummas Í Garði

KAMAR
25 kvm, við atgongd til wc/bað, til leigu beinanvegn. Vælegnað til goymslurum. Kostn. 1.500 kr.
Tlf. 14902, eftir kl. 16

SETHÚSINI
undir Fossum 69, Klaksvík, til sølu um nóg høgt boð fæst.
Tlf. 55671

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Undir Varða í Havn. 3.000 kr. um mðr. + ljós og hita at býta við annan leigara.
Tlf. 84576 - 10604

HÚS YNSKJAST
til leigu í Havn ella á Argjum. Mugu vera í barnavinarligum umhvørvi. Prísuppskot uml. 4.000 kr. við el og hita.
Tlf. 19888, eftir kl. 18

KAMAR TIL LEIGU
á Kambsdali við atgongd til køk, stovu og bað, til edrúuligt fólk.
Tlf. 44878

YNSKIST!
Er nakar, ið hevur eina íbúð í Berjabrekku at framleiga mær? Má hava tvey kømur.
Tlf. 19582, eftir kl. 16

HÚS
á Nýggjavegi til sølu.
Tlf. 55746



Bøkur

ILLUSTRERT NORSK BIBELLEKSIKON
í góðum standi. Trý vøkur slitsterk bind á fleiri túsund blaðsíður fyri 1.500 kr.
Tlf. 21646 - 89646

BÍBLIUSKÚLIN
fyri alt húskið! 12 stórar, vakrar, beint komnar heim frá forlagnum. Skrivaðar á norskum fyri og av øllum kristnum kirkjum um øll bíbl. evni og orð sum t.d. eisini Aids, Forurening, Ozonlagið, Energi o.a. Forlagsprisur kr. 4.745. Nú og árið út bert kr. 3.745 við at gjalda kr. 100 hv. mán. Kontant stórur avsl.
Tlf. 21646 - 89646

DAGBÓKIN
hjá Graba frá 1828 og Eindarmentan føroyinga og Vekingarrørslurnar, báðar á føroyskum, innb., ólisnar fyri ávikavist 40 og 50 kr.
Tlf. 21646 - 89646



Dýr

KETTA BURTURMIST
Malla er burtur! Hon er grá og brúnstriput við ljósareyðum hálsbandi. Býr uttanfyri kirkjugarðin í Havn.
Tlf. 15901

KETTA FUNNIN
Lítil, grá/svørt ketta við hvítum labbum er komin at ganga í Folagerði. Kettan hevur ljósareytt hálsband.
Tlf. 17847

BORDER COLLIE
hvølpar til sølu.
Tlf. 61133

BØGA
til sølu.
Tlf. 73330

YNSKIST
Hamstrarabúr ynskist til keyps.
Tlf. 19826

TIL SØLU
Tvær skjaldbøkur við akvarium og steinum til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 48690

KETTA BURTURBLIVIN
Tvey ára gomul ketta burturblivin frá Reynsgøtu 77. Er grástriput um høvd, rygg og hala, annars hvít. Hevði reytt/grátt endurskins hálsband. Er lág av vøkstri. Samsyning verður latin.
Tlf. 18361

GOTT HEIM TIL KETTLING SØKIST
Vit sóknast eftir einum góðum heimi hjá djóravini til ein 2–3 mðr. gamlan, grástriputan kettling. Eigarar hansara hava gloymt hann. Nærri at vita við at ringja
Tlf. 11912 ella 11598, Djóraverndarfelagið

NAKRIR GÁSARUNGAR
til sølu.
Tlf. 41225

Fundur

FELAGIÐ FØROYAR-KUBA
4. brigadufundur verður leygardagin 2. des. kl. 15 á Bergsvegi 6, í Havn. Limirnir biðjast møta fjølmentir.
Nevndin

FRÁ STRÁLUNI
Ársaðalfundur verður mikukvøldið 29. nov. kl. 21.
Strálan



Húsarhaldstól

TIL SØLU
El ovnur, 700 W, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 17244/84250

TIL SØLU
Elektronisk Singer seymimaskina til sølu fyri 5.498 kr. Nýprisur 9.998 kr. Hálvelektronisk seymimaskina til sølu fyri 3.800 kr. Nýprisur 5.998 kr. Elseymimaskina Zik-Zak, 850 kr.
Tlf. 12122

TIL SØLU
Hond seymimaskina í góðum standi til sølu fyri einans 600 kr.
Tlf. 12122

STÓRT KØLISKÁP
við glashurð (til handil) ynskist til keyps.
Tlf. 18737

GRAM KØLISKÁP
til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 13238


TIL SØLU
Melissa 6 pers. uppvaskimaskina til sølu fyri 1.800 kr. vegna keyp av størri.
Tlf. 16884

KØLISKÁP
v/ frystiboks til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 17244/84250

KOMFÝRUR
Ein sera góður Elektrolux komfýrur til sølu fyri 2.800 kr.
Tlf. 23080

TIL SØLU
Komfýrur og eimhetta til sølu.
Tlf. 47077

TIL SØLU
A.E.G. Vampyr dustsúgvari til sølu fyri 1.000 kr. Er so gott sum óbrúktur.
Tlf. 12043



Innbúgv

SOVISOFA
Rustreyð við smølum, ljósum stripum, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 19568

TIL SØLU
Sera góður skrivstovustólur. Góður fyri ryggin, kann innstillast bæði í setri, rygg og hædd. Bordeux littur, bert 1 ára gamal. Nýprisur 2.500 kr. Fæst fyri einans 1.500 kr.
Tlf. 12166

TIL SØLU
Vælhildin 2 pers. sofa, ið kann sláast út til dupultsong, til sølu fyri einans 1.000 kr.
Tlf. 12166

TIL SØLU
2 pers. svørt leðursofa og sofaborð úr bók, sera væl viðfarið.
Tlf. 12737

TIL SØLU
Dekktoysskáp, taburett og tvey náttborð, alt í gomlum stíli, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 24309

YNSKIST
Stór, helst brún leður hornasofa ynskist til keyps.
Tlf. 19854, eftir kl. 18

TIL SØLU
Tvær sovisofur og eitt sofaborð.
Tlf. 12344

TIL SØLU
Boxmadrassa, 140x200, við rullumadrassu og beinum úr bókarviði, til sølu fyri 750 kr.
Tlf. 15914

TIL SØLU
Myrkt, ovalt spísistovuborð við 6 stólum til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 55237

TIL SØLU
Tvey sofaborð, annað myrkt við kaklum, 79x141 cm, 800 kr. Hitt myrkt, 67x 67 cm, 300 kr.
Tlf. 14485

LEÐUR HORNASOFA
til sølu fyri 3.000 kr. Nýprisur 23.000 kr.
Tlf. 13238

TIL SØLU
3 dup. heingi- og liggiskáp og nakað av baðirúmsmøblum.
Tlf. 47077

Jólaborðhald

HÁRFRÍÐKUNNAR-FELAGIÐ
skipar fyri jólaborðhaldi fyri limum 9. des. Tilmelding áðrenn 28. nov. á
Tlf. 15069 - 16077